# Tvey heiðursmerki

**Føroysku svimjararnir fingu tvey heiðursmerki mikukvøldið, og voru tey bæði úr bronsu**

SVIMJING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Tveir føroyskir svimjarar svumu seg til heiðursmerki í svimjingini mikudagin, og í báðum førum var talan um føroyskt met hjá teimum, so ikki kann sigast annað enn, at avrikini vóru í lagi.

Eivind Eysturoy fekk bronsu á 100 metra teininum í frísvimjing. Tíðin hjá honnum var 52,94 sekund, og er hetta nærum eitt heilt sekund betri betri enn gamla metið.

Sjálvur segði Eivind eisini aftaná, at hann sjálvsagt var sera væl nøgdur.

- Teir, sum vunnu gull og silvur svumu so nógv skjótari, so bronsan var tað mesta, sum eg kundi røkka.

## 2/100 skiltu

Eisini Asbjørn Hansen setti met á teininum, 50 metra firvald. Asbjørn vann sær við hesum eitt bronsumerki við tíðini 26,60. Beint aftan fyri Asbjørn var gamli eigarin av føroyska metinum, Eivind Eysturoy, sum bert var 2/100 sekund aftan fyri liðfelagan.

Tá vit eftir hetta hittu Asbjørn, var hann sjálvandi fegin um bronsuna, men hann var kortini keddur um, at tað var so tætt millum seg og Asbjørn.

- Hevði tað bara verið onkur annar, sum var so nær við. Sjálvandi eri eg fegin um bronsuna og metið, men tað er keðiligt at skula taka tað frá einum, sum tú venur saman við hvønn dag.

## Met til Báru

Annars setti Bára Joensen eisini føroyskt met í 100 metra bringu, har hon svam í tíðini 1.20,00. Talan var samstundis um bólkamet hjá Báru, so hóast tað ikki rakk til heiðursmerki, so var hon sjálvandi nøgd um hetta.

Annars gjørdist Bára nummar átta í 50 metra frí, og við tveimum finaluplássum rakk hon soleiðis tí málinum, sum hon setti.



*Asbjørn hansen stendur her á pallinnum, meðan Eivind Eysturoy við 2/100 var noyddur at taka til takkar við fjórða plássinum Eivind vann sær annars bronsu í 100 metra frísvimjing*

# Venjarin skilti einki

**Landsliðsvenjarin í svimjing ætlar ikki at broyta nakað við svimjiháttinum hjá Asbjørn Joensen**

SVIMJING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen - Isle of Man*



*Petur Heðin skilti lítið av tí heila, tá føroyska stafettin varð kolldømd*

Petur Heðin av Fløttu dugdi ikki at síggja, hví Asbjørn absolut skuldi kolldømast av dómaranum, tá stafettin varð svomin mikudagin

- Hann svam akkurát sum hann plagar. Hann hevur verið í hylinum seks ferðir higartil, og hevur vunnnið trý heiðursmerki. Hann hevur onga ávaring fingið um nakað sum helst, og so verður hann bara diskaður nú. Tað skilji eg ikki.

Spurdur, um hetta við størkunum hjá Asbjørni er nakða, sum venjarin fer at arbeiða við, sigur Petur Heðin, at tað er tað ikki.

- Hann svam akkurát soleiðis, sum hann plagar at gera. Soleiðis hevur hann svomið í fleiri ár. Bæði í Danmark og Føroyum, og hann er ongan tíð kolldømdur fyrr, so hatta skilji eg slettis ikki. Tað vísur seg bara soleiðis, sum um stafettin skal kiksa hjá okkum.

## Vanligt við ávaring

Petur Heðin ilskast annars um, at Asbjørn ikki hevur fingið nakra ávaring fyrr í kappingini, fyri síðani brádliga at verða kolldømdur.

- Vanliga hevur tað verið soleiðis, at svimjararnir fyrst fáa ein lyftan peikifingur, og um teir so blíva við, verða teir kolldømdir. Nú havi eg ikki verið við á teknisku fundunum, so eg veit ikki, hvat tey hava tosað um har, men hatta er ein ótrúliga løgin dómur, men tað fáa vit so ikki gjørt nakað við, sigur Petur Heðin at enda.

# Akkurát ikki heiðursmerki

**Bogi Kristiansen og Rógvi Johansen endaðu beint uttan fyri heiðursmerkjarøðina í landsavegssúkklingini**

SÚKKLING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle og Man*



*Áðrenn starturin varð skotin av, var tøgn í ein minutt til minnis um føroyska súkklarar, Eyðun Poulsen*

Vónirnar vóru um heiðursmerki, tá føroysku súkklararnir fóru undir 108 kilometra langu rutuna á landavegnum.

Serliga vóru tað Bogi Kristiansen og Rógvi Johansen, sum kundu gera nakrar skreytir á teininum, og tað var eisini sera nær við, at tað eydnaðist teimum at vinna sær okkurt merki.

## Vóru alla tíðina við

Súkklað varð eftir einum níggju kilometra longum teini, sum súkklararnir so skuldi koyra 12 ferðir runt, og longu eftir tveimum umførum, hevði ein lítil bólkur skilt seg frá restini.

Bæði Bogi og Rógvi vóru við í hesum bólkinum, og næstu átta umførini fylgdu teir við í hesum. Tveir súkklarar stungu skjótt av frá bólkinum, og líkt var til, at kappingin hjá hinum fór at snúgva seg um bronsumerki.

Í hesi kapping vóru Bogi og Rógvi við fram til næst seinasta umfar, tá tveir aðrir súkklarar fóru avstað. Bert annar av hesum megnaði tó at halda allan vegin á mál, og bólkurin hjá Boga og Rógva kom sostatt at kappast um fjórða plássið.

Hesa kapping vann Bogi, meðan Rógvi kom a mál sum nummar seks, og alt í alt má hetta metast sum eitt gott úrslit.

Tað skerst tó ikki burtur, at tað er eitt sindur frustrerandi fyri súkklararnar, at teir í báðum teimum fyrstu kappingunum hava tikið sær av fjórða plássinum. Seinasta kappingin hjá teimum verður býarkoyringin, sum er á skránni fríggjadagin.





*Kjartan Eli Hentze og Petur Niclasen taptu tepurt móti gotlendingum hósmorgunin, men bronsan má eisini metast sum eitt sera gott úrslit*

# Bronsa í tvímansleiki

**Fyri fyrstu ferð hava føroyingar nú ogna sær tvey heiðursmerki á Oyggjaleikunum**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Føroyingar hava hesa ferð tryggjað sær tvey heiðursmerki í borðtenniskappingini.

Sum tað framgongur aðra staðni á síðuni, so hevur Kjartan Eli Hentze í øllum førum tryggjað sær bronsumerki í einmansleiki, og í tvímansleiki spældi hann seg saman við Peturi Niclasen fram til hálvfinalurnar.

Í fjórðingsfinaluni spældu teir báðir móti tveimum úr Saaremaa, og her eydnaðist tað okkara monnum at vinna 15-21, 21-15 og 21-12.

Í hálvfinaluni hittu teir so teir báðar sterku gotlendingarnar, Ola Granlund og Michael Svensson.

Gotlendingarnir vóru uttan iva favorittar at vinna dystin, men Kjartan Eli og Petur megnaðu tó at geva teimum sera harða mótstøðu.

Eftir at hava tapt fyrsta settið 12-21, eydnaðist tað føroysku leikarunum at vinna 23-21 í næsta settinum.

Triðja settið var sera javnt, og í løtum vístu okkara menn rættiliga stórspæl, men teir máttu tó at enda geva seg. Endaliga úrslitið varð 21-15 til gotlendingarnar, men tað var ikki fyrr enn seinastu bóltarnar, at veruligur munur kom í støðuna.

Hetta er aðru Oyggjaleikirnir á rað, at Føroyar vinna bronsu í tvímansleikinum. Fyri tveimum árum síðani vóru tað Kjartan Eli og Hans Hammer, sum komu í hálvfinaluna, og í ár er tað so saman við Peturi Niclasen, at Kjartan Eli hevur vunnið sær bronsuna.

Føroyar-Saaremaa 0-3 (16-25, 20-25, 9-25)

# Menninir fingu bank

**Manslìðið í flogbólti varð hólvað ígjøgnum av Saaremaa, men eru kortini við í hálvfinaluni**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Føroysku menninir kundu púra frígjørdir fara á vøllin, har teir skuldu royna at vinna fyrsta føroyska sigurin hjá monnum á Saaremaa.

Hetta varð tó av ongum, og í veruleikanum var tað heldur ongan tíð nær við, at so varð. Føroyingarnir vórðu snøgt sagt settir upp á pláss av einum væl uppløgdum Saaremaa liðið, og spurningurin tykist vera, hvørt okkara fara at hava nakran møguleika, tá teir í hálvfinaluni skulu spæla móti Gotlandi, sum vann hin bólkin framman fyri Áland.

Tann dysturin varð leiktur eftir evstamark okkara hósdagin. Kvinnurnar skulu í sínari hálvfinalu spæla ímóti Gibraltar, og teirra uppgáva tykist vera heldur meira yvirkomulig.



*Føroysku flogbóltsmenninir máttu niðurboygdir av vøllinum, eftir at greiða tapið fyri Saaremaa varð stafest*

# Kjartan Eli fær minst bronsu

**Sterkasti føroyski borðtennisleikarin hevur spælt seg fram til hálvfinalurnar**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Kjartan Eli Hentze hevur nú leikt seg til hálvfinalurnar í borðtennis, og hevur har við tryggjað sær í øllum førum eitt bronsumerki. Spælt verður nevnliga ikki um triðja og fjórða plássið

Meðan hinir føroysku leikararnir byrjaðu einstaklingakappingina týsdagin, var Kjartan Eli framman undan kappingini seedaður, soleiðis at hann ikki kom við fyrr enn farið varð í holt við 1/8 finalurnar.

Her møtti Kjartan Eli fyrst einum leikara av Guernsey, og her eydnaðist Kjartani Eli at vinna dystin í trimum settum. Roknað varð annars við, at dysturin ikki skuldi verið so torførur, tí í liðkappingini hevði Kjartan Eli vunnið rættiliga trygt á hesum sama leikara.

Efitr dystin segði Kjartan Eli, at hann nú fyrst og fremst var glaður um at vinna dystin.

- Tað týdningarmesta í hesum dystinum var, at eg nú eri komin ígongd. Eg roknaði heldur ikki við nøkrum løttum dysti, tí tá eg vann móti honum í liðkappingini, var dysturin avgjørdur, so hann hevði einki at spæla fyri.

- Orsøkin til, at dysturin í dag gjørdist so torførir, var, at hann fekk koyrt meg alt ov nógv runt í fyrsta settinum. Eg fekk tó tamarhald á spælinum, og nú gleði eg meg bara til at koma til næsta dystin.

## Stórspæl

Í hesum dystinum hevði Kjartan Eli veruliga fingið rætta spælið fram, og sterki gotlendingurin, Ola Granlund, sum m.a. hevði vunnið á Kjartani Eli í liðkappingini, mátti lúta 23-21 og 21-13.

Í hálvfinaluni bíðar nú Michael Svensson av Gotlandi, sum eisini vann á Kjartani Eli í liðkappingini. Svensson er styrkismettur sum nummar tvey í kappingini, so talan verður í øllum førum um ein harðan dyst hjá Kjartani Eli.

Kjartan Eli skuldi um døgurðatíð hósdagin spæla hálvfinaluni, men hetta var eftir evstamark okkara.

## Bergur fekk bank

Annars taptu hinir báðir føroysku leikararnir, sum høvdu leikt seg fram til endaspælið.

Petur Niclassen tapti í trimum settum, móti einum leikara úr Jersey, meðan Bergur Jacobsen ongan sum helst møguleika hevði, tá tað varð greitt, at hann skuldi spæla móti suverent sterkastas leikaranum í kappingini, Carl Prean.

Bergur hevði eitt sindur provokerandi latið seg í tveir ymiskar skógvar, umframt eina ermaleysa undirtroyggju, og eftir dystin segði hann, at hetta ikki bara var til stuttleikar.

- Tað var líka so nógv fyri at signalera til hansara, at vit aðrir so slettis yvir høvur ikki hava nakran møguleika.

- Vit taldu eftir liðkappingini úrslitini hjá honum saman, og tað vísti seg, at hann í miðal bert hevur tapt seks bóltar fyri hvørt settið, og tá hevur hann spælt móti sterkastu leikarunum hjá hinum londunum



*Beint áðrenn blaðið fór til prentingar, varð hálvfinalan hjá Kjartani Eli liðug. Úrslitið gjørdist eitt 0-2 tap, men serliga í seinna settinum var talan um ein sera spennandi dyst. Settið endaði 22-24*